Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði

EIÐIS KOMMUNA

# Bygdaráðsfundur

Fundur nummar: 3/2025
Fundardagur: mánadagin kl. 18:00 24.februar 2025
Viðmerking: Fundarskrivari : Guðrun Ejdesgaard

Møtt:

Jógvan í Skorini

Tonny Snogebæk Kruse

Tove Kruse Samuelsen

Fróði Reinert Petersen

Olaf Fríðheim

Sigurður Eiríksson

Kristian Martin Juul

Fráboðan, ikki møtt:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Málnummar | 460 | Journalnr. | **324-3-2025** |
| Málslýsing | Staðseting av frítíðarskúla | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði

Bygdaráðsfundur

| Til samtyktar | Fróði ynskir at fáa hesa viðmerking og broytingaruppskot í fundarbókina.<br><br>Undanfarna bygdaráð legði nógva tíð og orku í ætlanina um nýggjan frítíðarskúla. Hetta arbeiði verður nú kveistra til viks, uttan nakra góða grundgeving. Tað er neyvan nakar, sum ivast í at besta staðseting er í Hólmanum og hetta hava bæði byggifakliga og námsfrøðiliga serfrøðing staðfest. Á bygdaráðsfundi 15.januar 2025 greiddi borgarstjórin frá, at tað bara er byggisamtyktin sum forðar fyri, at frítíðarskúlin verður bygdur í Hólmanum. At byggja á Skinindakletti er heilt burtuvið, tí tað verður ein munandi dýrari loysn á einum verri egnaðum stað, sum enntá sigst vera millum veðurringastu støð í bygdini. Harafturat fer ætlaða húsið bert at vera til ein av trimum ætlaðum brúkarabólkum.<br><br>Broytingaruppskot:<br><br>**Mælt verður til, at borgarstjórin arbeiðir víðari við bygging av frítíðarskúlanum í Hólmanum, møguliga í einari tillagaðari útgávu.**<br><br>2 atkvøður fyri broytingar uppskotinum, Fróði Reinert Petersen og Kristian Martin Juul. 4 atkvøður ímóti broytingar uppskotinum Olaf Fríðheim, Tove Kruse Samuelsen, Sigurður Eiríksson og Jógvan í Skorini.<br><br>Upprunauppskot:<br><br>**Til samtyktar, at staðseta frítíðarskúlan á Skínindaklett**<br><br>4 atkvøður fyri, Olaf Fríðheim, Tove Kruse Samuelsen, Sigurður Eiríksson og Jógvan í Skorini. 2 akvøður ímóti, Fróði Reinert Petersen og Kristian Martin Juul. |
|---|---|
| Viðmerking | Tonny boðar frá ógegni. Einmælt samtykt at Tonny ikki verður við í viðgerðini. |

| Málnummar | 461 | Journalnr. | **544-4-2025** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Vegagerð Skínindaklett/Múlaklett | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði

Bygdaráðsfundur

| | |
|---|---|
| Til samtyktar | Fróði ynskir at fáa hesa viðmerking og broytingaruppskot í fundarbókina.<br><br>Á bygdaráðsfundi 15.januar 2025 greiddi borgarstjórin frá, hvussu ómetaliga stórar fíggjarligar bindingar kommunan hevið átikið sær. Um hetta skal takast í álvara, so kann tað í løtuni tykjast sera ábyrgdarleyst at fara undir hesa vegagerð, sum er púra óneyðug. Hendan íløga eigur at vera raðfest øðrvísi og heldur verða brúkt sum ískoyti til nýggjan frítíðarskúla, eitt nú í Hólmanum, har sum tað er klárt at fara undir at byggja.<br><br>Broytingaruppskot:<br><br>**Mælt verður til, at hendan íløga ikki verður gjørd nú, men verður útsett til seinni, tá kommunan hevur betri pláss í íløgukarminum**.<br><br>3 atkvøður fyri, Tonny S. Kruse, Kristian Martin Juul og Fróði R. Petersen, 4 ímóti, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Tove K. Samuelsen og Jógvan í Skorini.<br><br>Upprunauppskot:<br><br>**Til samtyktar at gera eitt projekt og kostnaðarmeting**.<br><br>4 atkvøður fyri, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Tove K. Samuelsen og Jógvan í Skorini<br>3atkvøður ímóti, Tonny S. Kruse, Kristian Martin Juul og Fróði R. Petersen |
| Viðmerking | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Málnummar | 462 | Journalnr. | **548-12-2024** |
| Málslýsing | Endurskoðan av máli nr.2 frá 18.12.24 ( Marknaumskipan matr. y og 148b, Eiði ) | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði

Bygdaráðsfundur

| | |
|---|---|
| Til samtyktar | Fróði ynskir at fáa hesa viðmerking og broytingaruppskot í fundarbókina.<br><br>Talan er her um ein teknikalitet, sum forðar fyri marknaumskipan. Tað seinasta pettið av vegnum má í praksis metast sum rímiligur atkomuvegur til og frá matr 148b.Tí haldi eg (Fróði R. Petersen) at eigarin av matr 148b hevur eitt rímiligt krav uppá nýtslurættin til tað pettið hann hevur søkt um.<br><br>Broytingaruppskot :<br><br>**Mælt verður til, at málið verður beint aftur í teknisku nevnd, at kanna møguleikan at broyta byggisamtyktina, so marknaumskipanin kann fremjast.**<br><br>3 atkvøður fyri, Tonny Kruse, Kristian Martin Juul og Fróði R. Petersen, 4 atkvøður ímóti, Olaf Fríðheim, Sigurður Eríksson, Tove K. Samuelsen og Jógvan í Skorini.<br><br>Upprunauppskot:<br><br>**Til samtyktar, at taka loyvi til keypið inn aftur.**<br><br>4 atkvøður fyri, Olaf Fríðheim, Sigurður Eiríksson, Tove Kruse Samuelsen og Jógvan í Skorini, 3 atkvøður ímóti, Tonny Kruse, Kristian Martin Juul og Fróði R. Petersen |
| Viðmerking | |

| Málnummar | 463 | Journalnr. | **108-1-202** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Stroyming av bygdaráðsfundum | | |
| Til samtyktar | Einmælt samtykt at stroyma bygdaráðsfundirnar | | |
| Viðmerking | | | |

| Málnummar | 464 | Journalnr. | **108-1-2025** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Tilboð um útgerð til stroyming í Kolshøll | | |
| Til samtyktar | Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá RaClip á kr. 56.719,00 u/mvg | | |
| Viðmerking | Olaf boðar frá ógegni. Einmælt samtykt at Olaf ikki verður við í viðgerðini. | | |

| Málnummar | 465 | Journalnr. | **324-8-2023** |
|---|---|---|---|
| Málslýsing | Frágreiðing um uppíbygging vestan fyri Ítróttarhøllina | | |

Tel. 200 400
www.eidi.fo
eidi@eidi.fo

Brekkuvegur 37
FO-470 Eiði



| | |
|---|---|
| Til samtyktar | Hans Andrias Dahl kom á fundin, at geva eina frágreiðing um uppýbygging vestan fyri Ítróttarhøllina. |
| Viðmerking | |

Fundur lokin kl. 19.05

**Viðmerking:**

34 áhoyrarar

Fundarfrágreiðingin er skrivað í fundarbókina og váttað av øllum møttum bygdaráðslimum

**Aðrar viðmerkingar:**

Jógvan í Skorini, borgarstjóri